Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogar til Sambýlið á Fugloyarvegi 9 í Tórshavn

Trý størv eru leys at søkja til setan 1. februar 2009.

Til Sambýlið á Fugloyarveg 9 hoyra tvey onnur sambýli - annað er á Grønlandsvegi 59 og hitt er í Svanga 24. Talan er sostatt um trý sambýli, har 6 menningartarnað fólk búgva í hvørjum húsi. Nøkur teirra hava stóran tørv á hjálp og onnur vegleiðing og stimbran til at klára tær ymsu uppgávurnar sjálvi, tí er uppgávan hjá starvsfólki at tilrættisleggja dagligdagin soleiðis, at búfólkini eru við í øllum uppgávum og harvið føla ábyrgd og trívast.

**Arbeiðsuppgávur**
- At vegleiða og stimbra húsfólkini at klára síni húsligu ting
- At tilrættisleggja dagligdagin fyri alt húskið
- At takað húsfólkini við í tær uppgávur, ið eru
- At fara til aktivitetir uttanfyri húsið
- At ganga túrar v.m.
- At keypa inn
- At gera mat við húsfólkunum
- At gera reint í húsinum við húsfólkinum

**Førleikakrøv**
- At tú kannst arbeiða sjálvsstøðugt og ikki er bangin fyri at at taka ábyrgd
- At tú hevur evni og vilja til at samstarva og samskifta við húsfólkini og við tínar starvsfelagar.
- At tú kanst luttaka aktivt í øllum avbjóðingum á arbeiðsplássinum
- At tú sært møguleikar fram um forðingar
- At tú saman við búfolki skapar ein innihaldsríkan dagligdag
- At tú er væl fyri fysiskt og psykiskt
- At tú tolir broytingar í arbeiðinum

**Løn og setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag

Størvini verða sett til tann 1. februar 2009 ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Eydnu Nicolajsen á tlf. 763110.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Sambýlið
Fugloyarvegur 9
100 Tórshavn
Stílað: Eydnu Nicolajsen, leiðara

**Umsóknarfreist: 20. jan. 2009**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Starvsfólk til sambýlini í Sandavági

Søkt verður eftir einum starvsfólki i eitt farloyvisstarv til sambýlini í Sandavági at byrja 1. mars 2009 til 31. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

Í sambýlinum búgva sinnisveik fólk, ið hava tørv á eginumsorgan, tryggleika og einum struktureraðum gerandisdegi.

Tað eru fleiri aktivitetir bæði inni og uttan fyri húsið, har starvsfólkini luttaka aktivt saman við búfólkunum.

**Arbeiðið hjá starvafólkunum fevnir um**
- At stimbra og menna praktiskar og sosialar førleikar hjá búfólkunum.
- At stimbra ígongdsetan av virksemi, ið búfólkini ynskja ella hava tørv á.
- At geva ráð og vegleiðing í vanligum dagligum virki, samstundis sum atlit verður tikið til, hvat búfólkini megna.
- At skipa so fyri, at búfólkini fáa møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv**
Tú hevur:
- viðkomandi heilsusosialfakliga ella pedagogiska útbúgving.
- royndir innan psykiatriska økið.
- tol og eina jaliga menniskjafatan.
- evni at handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið onki kann sigast um frammanundan.
- áræði, hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt

**Lønar- og setunartreytir**
Setanarøkið er Nærverkið, arbeiðstíðirnar eru skiftandi, dag-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Tann, ið settur verður má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Løn sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Fleiri upplýsningar um størvini eru at fáa hjá Signu Andreasen, leiðara, tlf. 283213.

**Umsókn**
Umsóknir skulu sendast til:

Sambýlið
Stíla: Signa Andreasen
Traðarvegur 34
360 Sandavágur

**Umsóknarfreist: 4. jan. 2009.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo




Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo